# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri hjálpsemi og sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Alma Rustin**
**Fuglafjørður**

doyði og varð jarðað.

Tøkk til tykkum í Vesturstovu, sum vóru um mammu, og tykkum, ið fylgdu henni til seinasta hvíldarstaðið.

*Vegna familjuna*
**Margretha, Ingun og Hildugarð**

# Mungát gott fyri sinnið

TÍÐINDASKRIV

Stóra kappingin millum føroysku bryggjaríini og tey útlensku ger, at tað støðugt koma nýggj merki og nýggjar vørur á marknaðin. Hósdagin 18. juli kemur túrurin aftur til Restorffs Bryggjarí. Tá kemur spildurnýggja bjórið við tí heldur sjáldsama og vælklingandi forna heitinum "MUNGÁT" á marknaðin. Orðið er tikið úr Seyðabrævinum. Tað er ikki av tilvild. Tí í hesum forna og søguliga skjali verður tilskilað, hvussu nógv ein maður skal gjalda fyri vetrarvistir. Fær hann umframt mat og húsarúmd eisini MUNGÁT, tvs. øl, skal hann sjálvandi gjalda meira. Orðið MUNGÁT er gamalt norrønt navn. MUN merki sinni, og GÁT tað sum er gott (sbr. góðgæti). MUNGÁT er sostatt gott fyri sinnið stendur í tíðindaskrivi frá Restorffs bryggjarí.

Har stendur eisini, at hetta er eitt sera heppið mentanarligt orð, sum Jóhan H. W. Poulsen hevur hjálpt Restorffs við. Etikettuna hevur Reproz teknað. Oman fyri Sigmundarkrossin stendur: "Omnia Pro Cervisia", sum merkir: "Alt fyri ølið". Petur Martin Rasmussen hevur staðið fyri latínsku tíðingini.

Gamlir føroyingar bryggjaðu nógv øl heima og nýttu teir bygg til hesa framleiðslu. MUNGÁT er sostatt gamla føroyska heitið fyri øl, meðan tað innflutta danska ølið varð rópt bjór. Restorffs Bryggjarí vil tí fegið hoyra frá bóndum, sum hava møguleika at velta eitt sindur av bygg, so bryggjaríið kann framleiða eina heilt vistfrøðiliga øl stendur í tíðindaskrivinum.






# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum mintust okkum á krúndiamantbrúdleypsdegnum 30. mai 2002 við gávum, fjarritum, blómum, telefonsamrøðum og tykkum, sum stukku inn á gólvið.

Gud vælsigni tykkum øll.

*Heilsan*
**Albinius og Karolina Johannesen**
800 Tvøroyri

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkensku og hjálpsemi, tá góði pápi, verpápi og abbi okkara

**Jákup M. Lamhauge**
ættaður úr Rituvík
búsitandi í Havn

andaðist og var jarðaður.

Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar, gravarar og berarar, tøkk fyri blómur, kransar og gávur.

Ein serstøk tøkk til tykkum øll á Landssjúkrahúsinum og Útslúsingardeildini sum vóru um hann, hesi bæði árini hann lá sjúkur. Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunar vegna*
**Jonna Elisa, Dan og Heðin**

# Politistur

**Eitt arbeiði við avbjóðingum**

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

**Eitt arbeiði allan sólarringin**

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at rokka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

**Løn og útbúgving**

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

**Menning og karriera**

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt høskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 14 48 Fax 35 14 49
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. Fýra politistar skulu setast í 2003.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 1/9-2002



# Statoil kring Føroyar

# Hvør vinnur Bláu førara troyggjuna 2002





Bláa førara-troyggjan

**Okkurt gott verður til áskoðaran, m.a. kaffi, sodavatn o.a.**

**Á øllum teinunum bjóðar Statoil tvíflís, kaffi og te til luttakararnar.**

**Fylgið við Statoil kring Føroyar á www.tsf.fo**

## Súkklukapping

**Dagur 1, Mikudagur 17. juli, Norðoyggjar - Prologur**

**Startur og mál:** Statoilstøðin í Klaksvík
***Einkultstartur,*** *uml. 8 km.*

***Kappingin byrjar*** *kl. 18.15 og sigurshald verður uml. kl. 19.00*

**Dagur 2, Hósdagur 18. juli, Eysturoy - 1. teinur**

**Startur:** Statoilstøðin í Gundadali
**Mál:** Statoilstøðin í Runavík
***Samlaður startur,*** *uml. 120 km.*
*Umleið kl. 14:30 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Leirvík.*
*Umleið kl. 15.00 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Runavík.*
*Umleið kl. 15:30 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Runavík (á mál).*

***Kappingin byrjar*** *kl. 12.30 og sigurshald verður uml. kl. 17:00*

**Dagur 3, fríggjadagin 19. juli, Sandoy**

**Startur og mál:** Statoilstøðin á Sandi.
***Einkultstartur,*** *uml. 27 km.*

***Kappingin byrjar*** *kl. 15.30 og sigurshald verður uml. kl. 17.00*

**Dagur 4, leygardagin 20. juli, Suðuroy**

**Startur og mál:** Statoilstøðin á Tvøroyri.
***Samlaður startur,*** *uml. 80 km.*

***Kappingin byrjar*** *kl. 12.30 og sigurshald verður uml. kl. 16:00*
*Umleið kl. 13:30 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Vági.*
*Umleið kl. 14:00 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Vági 2. ferð.*
*Umleið kl. 14:30 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini á Tvøroyri 1. ferð.*
*Umleið kl. 14:30 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini 2. ferð (á mál).*

**Dagur 5, sunnudagin 21. juli, Streymoy**

**Startur:** Vaglið á Eiði.
**Mál:** Statoilstøðin í Gundadali.
***Samlaður startur,*** *uml. 100 km*

***Kappingin byrjar*** *kl. 13.00 og sigurshald verður uml. kl. 17.00*
*Umleið kl. 16.30 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Gundadali.*
*Umleið kl. 16.40 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Gundadali 2. ferð (á mál).*

**STATOIL**
*Kring Føroyar*